LM-088/2023

Føroya Kærustovnur

Skylgiskjal 4.

Løgmálaráðið
Gongin 7
100 Tórshavn

Tórshavn, 05.02.2024
J.Nr.: 24/00804 (at tilskila í svari)
Viðgjørt: RDC/AH

Stílað: Elsa Magnussen, fulltrúi, elsam@lmr.fo

Ummæli - uppskot til løgtingslóg um fosturtøku (fosturtøkulógin)

Løgmálaráðið hevur sent *uppskot til løgtingslóg um fosturtøku (fosturtøkulógin)* til Føroya Kærustovn til ummælis.

Viðmerkingar Føroya Kærustovns snúgva seg í høvuðsheitum um § 16 í uppskotinum til løgtingslóg um fosturtøku (fosturtøkulógin), har leikluturin hjá Føroya Kærustovni í fosturtøkumálum verður skipaður.

Føroya Kærustovnur viðmerkir, at soleiðis sum orðaljóðið er í § 16 í lógaruppskotinum, og soleiðis sum serligu viðmerkingarnar til § 16 eru at skilja, so er tað í høvuðsheitum løgtingslóg nr. 147 frá 25. november 2021 um Føroya Kærustovn, sum er stýrandi fyri sjálva málsgongdina hjá Føroya Kærustovni í fosturtøkumálum. Hetta er m.a. galdandi í mun til viðurskiftini viðvíkjandi avgerð hjá Føroya Kærustovni í §§ 6-8 í løgtingslóg um Føroya Kærustovn og eisini í sambandi við setan av Føroya Kærustovni í § 5 í løgtingslóg um Føroya Kærustovn – tó havandi í huga serligu ásetingarnar í uppskotinum til løgtingslóg um fosturtøku um nýtslu av serkønum hjá Føroya Kærustovni í fosturtøkumálum.

Føroya Kærustovnur vísir á stóra týdningin av, at full greiða er um, hvussu málsgongdir skulu vera. Hetta ger seg serliga galdandi, tá talan er um viðkvom mál, sum skulu viðgerast í skundi. Tíðskil metir Føroya Kærustovnur tað vera skilagott, at tað í uppskotinum til løgtingslóg um fosturtøku (fosturtøkulógin), verður víst til løgtingslóg um Føroya Kærustovn í mun til grundleggjandi viðurskiftini í samband við málsgongdina hjá Føroya Kærustovni í fosturtøkumálum.

Føroya Kærustovnur hevur ikki fleiri viðmerkingar til uppskot til løgtingslóg um fosturtøku (fosturtøkulógin).

Vinarliga

Anja Hovgaard
stjóri